# Ein ungur einkjumaður skrivar dagbók

**Hans Jacob Hansen hevur síðan hann misti konuna, ið doyði av krabbameini fyri fimm árum síðan, skrivað niður sínar tankar, tá ríngast hevur staðið til**

LAGT TIL RÆTTIS
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Summi tiga sorgina burtur, onnur tosa allatíðina um hana, uppaftur onnur lossa sváru kenslurnar niður á hvíta pappírið.

Tað, sum kemur eftir hesi orð í hesi grein, tankar hjá einum lutfallsliga ungum einkjumanni, sum hevur fótað sær aftur eftir at lívið fyri hann og børnini næstan steðgaði, tá konan og mamman brádliga varð tikin frá teimum.

Næstu reglurnar og heilt fram til endan á hesi drúgvu grein eru orð einkjumannsins, hvussu hann greiðir frá sjúkraleguni, deyðanum, jarðarferð og tíðinini fram til dagin í dag.

Hetta er søgan um familjuna Lenvig Hansen í Tórshavn, nevniliga einkjumannin Hans Jacob Ronny Hansen og konu hansara, lærarinnuna Fridriku Lenvig og trý børn teirra, ið gjørdust móðirleys fyri 5 árum síðani, tá Fridrika eftir sera stutta sjúkralegu, brádliga doyði frá teimum...

## Sæla byrjanin

Vit fara at leita aftur til árið 1990.

Ein vakran dag í juli mánaði, júst 5. juli, við nógvari stákan. Henda dagin blivu Hans Jacob og Fridrika gift...

Brúðarvígslan var í Vesturkirkjuni kl.5 henda eftirmiddagin, síðani var farið til myndatøku og aftaná til hús saman við familju, vinum og kenningum at nýta eitt glas av champagnu.

Hans Jacob sigur at hann minnist hetta, sum eina sera hugnaliga løtu.

Fridrika og Hans Jacob áttu tvær smágentur tá, Irdi og Lóu, ið vóru 4 og 1 ára gamlar.

Irdi sigur seg minnast sera væl henda dagin, tá mamma og babba blivu gift.

Kl. 7 um kvøldið var boðið á Hotel Hafnia til brúðarveitslu, hetta var eitt stak hugnaligt kvøld og nakað út á náttina, saman við familju, vinum og kenningum.

Alt var pakkað og bilurin stóð klárur, tí morgunin eftir brúdleypið, skuldi farast á brúðarferð saman við børnunum, einum sysktnabarni hjá Fridriku, ið er tænari og drongi hennara, ið er hotell kokkur, túrurin gekk til Danmarkar.

Onkuntíð hevur verið skemtast við, at tey høvdu bæði tænara og kokk við á Brúdleypsreisina, tað skuldi verið gott, tað var tað eisini, sigur Hans Jacob.

Tey fóru so við Norrønu morgunin eftir...

Á bilinum hingu ballónir og følgg, eisini var málað á bilin NÝGIFT, so fólk heilsaðu og vóru sera fryntlig, tá koyrt var umborð á Norrønu, men tá tey komu á kamarið umborð á Norrønu, stóð champagna og stór skál við frukt á borðinum, ið onkur kendur persónur hevði skipað fyri.

Brúdleypstúrurin var sera góður, í einum summarhúsi í norður Jútlandi, tætt úti við strondina.

## Familjan nørist

Árini eru so gingin og Fridrika átti ein son í 1992, alt gekk væl og bleiv hann kallaður Ronni, so nú áttu Fridrika og Hans Jacob trý børn, alt teknaði til at blíva ein eydnurík framtíð, fyri hesa lítlu familjuna.

Fridrika var um hetta mundið lærarinna við Hvítanes Skúla, men flutti seinri oman til Hoyvíkar Skúla at starvast, tí ov fá børn vóru á Hvítanesi til skúlagond, meðan Hans Jacob hevði sína dagligu arbeiðsgongd úti á Landssjúkrahúsinum á psykiatrisku deild, hvar hann arbeiður, sum sálarsjúkrarrøktari.

Vit koma so fram til árið 1994, tá Fridrika av fyrstantíð byrjar at kenna sær eitt hvørt óregluligt fysiskt. Um hetta mundið er Ronni bert 11/2 ár, Lóa 5 og Irdi 9 ára gomul, nú mamman er við at gerðast sjúk, men av hvørjum, ella hvat er galið?.

Fridrika fór tá til kommunulæknan, ið kannaði hana, men tað var sjálvandi torført hjá honum at siga nakað um.

Hon var síðani víst til kanningar á Landssjúkrahúsinum.

Í fyrstani var tankin um møguligt magasár, tí pínan stavaði hagan ífrá.

Men seinri, eftir at hava fingið innlit í journal hennara, havi eg funnið útav, at man rættuliga tíðliga eftir røntgenkanning av lungunum, hevði mistanka um spjaðing av krabbameini, tí sæddir vóru nakrir óregluligir blettir á lungunum, hetta bleiv bara ikki sagt okkum.

Fridrika gekk síðani í óvissu, fleiri ferðir um vikuna á Landssjúkrahúsið, til ymiskar kanningar, hvar tað eftir hvørja kanning, bert bleiv sagt av læknunum citat: »Vit finna einki«, men læknarnir søgdu ongantíð hvørjum teir leitaðu eftir.

## Metestasir ella krabbi

Hvussu vit fingu at vita hvørjum teir leitaðu eftir... Hetta var tá Fridrika var innløgd til eina kanning og skuldi í røntgen.

Journalin lá á songini meðan hon bíðaði eftir at koma framat, hon tók sær tá tað fríheit at kaga í journalina, og har stóð skrivað á einum lepa, OBS. Metestasir , men hon var sjálvandi ikki heilt vís í, hvat hetta stóð fyri.

Tá hon seinri um dagin kom til hús, var tað fyrsta hon spurdi meg um, hvat hetta OBS. Metestasir, ið stóð í journal hennara merkti.

Eg má siga, at eg nokk ikki havi fingið størri skelk enn tað sama. Ja, soleiðis fingu vit boðini um sjúku hennara.

Nakrar dagar seinri tá vit vóru á Landssjúkrahúsinum, segði eg við ein av yvirlæknunum, hvat eg nú visti frá Fridriku.

Hesin yvirlæknin bleiv sera illa við, tá eg segði honum hetta, hann kom við nógvum undanførslum, ymiskum frágreiðingum og tyktist hann mær sera ørkymlaður.

Fridrika gekk so til kanningar á Landssjúkrahúsinum, heilt til fyrst í desember mánaði ´94, uttan nakra, sum helst viðgerð.



*Soleiðis minnast tey Fridriku*

14 dagar áðrenn hon fór niður á Ríkissjúkrahúsið, til víðari kanningar, hevði hon eina samrøðu við ein av yvirlæknunum á Landssjúkrahúsinum, hesin »bagatelliseraði« sjúku hennara, hvar hann setti 6–7 dømir upp um sjúkuna, og møguleikin fyri at tað var krabbamein, var aftast í røðini, hetta gav sjálvandi Fridriku og mær gott mót.

Á Ríkissjúkrahúsinum mátti hon so ígjøgnum allar hesar kanningarnar, ið vóru gjørdar á Landssjúkrahúsinum og nakað væl afturat. Síðani bleiv roynd tikin av blettunum á lungunum, men her bleiv uttan innballing staðfest og sagt, at hon hevði ringa krabbameinssjúku.

## Kemoterapi

Hetta vóru ring boð allar vegir, tí nú skuldi hon viðgerðast fyri hesa ringu sjúkuna, og hvussu fór tað at vera, tí alt lá í skeljasorði frá hesari løtuni av.

Orðið » Kemoterapi «, var ræðandi í sær sjálvum, tað hevði men hoyrt so nógv ringt um, tað var jú tann reina gift, sum bleiv sprænt inn í æðrarnar, fór tað at hjálpa og fór Fridrika at tola hesa viðgerðina.

Vit høvdu so nógv brúk fyri Fridriku og børnini, sum vóru í Føroyum, tey longdust so illa, nú vit vóru niðri á Ríkissjúkrahúsinum, bert eina viku undan jólum.

Vit komu aftur til Føroyar, í ringasta kavaroki 22. desember og trúgv mær at frøðin var stór, tá børn okkara sóðu okkum aftur, Fridrika var troytt.

Vit blivu so heima jólini av, Fridrika var sera troytt, men eg haldi at jólini gingu stórt sæð, sum vanligt, men vit vóru nokk nakað stúrin, tí leiðin skuldi leggjast niður aftur á Ríkissjúkrahúsið eftir nýggjár, tí hetta vóru børnini sjálvandi ikki serliga fegin um, at mamma og babba skuldu so skjótt niður aftur til Danmarkar, uttan at tey sluppu við.

Vit komu so aftur á Ríkissjúkrahúsið, fyrstu vikuna í januar mánaði ´95. Nýggjar kanningar vóru gjørdar, og Fridrika byrjaði við sínari »kemoviðgerð«.

Vanliga fært tú »kemo« sevjuna við droppi rennandi inn í æðrarnar, í tríggjar fylgjandi dagar, men hetta gekk ikki serliga væl, tí eitt av hjáárinunum er jú kvalmi, spýggja og ongin matarlyst.

### Sovnaði stillisliga

Fridrika sovnaði stillsliga inn náttina til 14. mars, eftir eitt ræðuliga hart stríð, fyri at halda seg á lívi, tí hon hevði so nógv at liva fyri og geva frá sær til so nógv.

Vit vóru rættuliga nógv rundanum hana, tá hon sovnaði inn uml. kl. 02.00 hesa feigdarnáttina.

Stemningurin var sjálvandi sera tungur nú, hóast eingin hevði gjørt sær greitt, hvat hetta fór at innibera fyri okkum, sum familja, nú okkara grundarsteinur og dagligi tryggleiki, var ryktur undan okkum.

Hetta var ein av mínum ringastu nætrum, og ikki minst tá tankin kom til mín, at eg skuldi siga børnunum morgunin eftir, at mamma teirra ikki var millum okkum meira.

Vit fóru seinri heim av Landssjúkrahúsinum, nøkur komu til hús við okkum.

Eg svav lítið og einki hesa náttina, um morgunin skuldi eg jú verða tann sterki og siga børnunum um mammu teirra.

Eg tók børnini inn á kamarið og upp í songina til mín, tá var eg faktisk, sum gele hugsi eg.

Eg fekk tó sagt børnunum um mammu, tað var ræðuligt, vit lógu jú øll har í songini sundurknúst og bara grótu, í eina langa, langa løtu, ja Gud viti hvussu leingi.

Eg fái ikki endurgivið hesi sundurknústu børnini, tí vit bara grótu, tosaðu, grótu so aftur og soleiðis helt tað bara á fram…

Hvat nú ???



Hjá Fridriku var tað verri enn so, tí hon stakk upp at bløða, mitt undir viðgerðini, tann næsta dagin, small um og fall í óvit, meðan blóðið streymaði frá henni.

Alarmarnir ringdu um alla gongina, har Fridrika var innløgd, men tíbetur var tað eg sjálvur, ið grípti henni, tá hon small um, mitt á gólvinum. Læknar og sjúkrasystrar komu og rennandi úr øllum heraðshornum, eg haldi tey vóru eini 5 ella 6 í tali, alt var ein stórur »forvirringur og kaos«.

Fridrika misti hvønn ein blóðdropa, men fekk innsprænt nýtt blóð í æðrarnar so hvørt, 5 litrar samlað.

Hevði hon ikki verið á Ríkissjúkrahúsinum tá, er nokk eingin ivi um, at lív hennara hevði hingið í einum enn klænri tráði, enn tað gjørdi frammanundan.

## Misti vitið

Tá hon kom fyri seg aftur tveir dagar seinri, segði hon, at hesir báðir dagarnir vóru totalt skræddir úr álmanakkanum, men Fridrika føldi seg sera væl tá, sjálvandi av tí nýggja blóðinum. Viðgerðina tann triðja dagin fekk hon ikki, men vit fóru heim til Føroyar, fyri at styrkja okkum, eftir tað ringu upplivingina,
á »Onkologisku deild« á Ríkissjúkrahúsinum.

Vit vóru glað fyri at verða við hús aftur, men eg haldi, at »kemoviðgerðin« eisini hevur tað ringa við sær, at um hon ikki riggar positiva vegin, byrjar tú hóast alt at síggja sjúkur út, tí tað gjørdi Fridrika eisini, hon sá veruliga sjúk út fyrst nú, meðan hon var sera troytt eisini.

Tað vóru tung spor, fyrst í februar at skula niður aftur á Ríkissjúkrahúsið, eftir tað ringu upplivingina vit høvdu havt, síðst vit vóru har.

Um børnini vóru kedd fyrstu ferð vit fóru avstað, so var standurin ikki betur nú, vit skuldu aftur til Danmarkar, tað er heilt ógjørligt at skriva um, hvussu ringt tað var at fara frá teimum aftur.

Fridrika fekk sína næstu seriu av »kemoviðgerð« í tríggjar fylgjandi dagar, uttan serligar trupuleikar, men sjálvandi tey vanligu hjáárinini kvalma, spýggju og eingin matarlyst, tí Fridrika var veruliga troytt nú, hetta við hjáárinunum av »kemoviðgerðini« heldur fram fleiri dagar, aftaná ein er liðugur við viðgerðina.

Vit royndu at halda mótinum uppi, við at stuðla hvørt øðrum, men torført er tað, tá tú sær hvussu tann persónurin, ið tú elskar so nógv, er so troyttur av sjúku og svinnur spakuliga burtur, og tú stórt sæð einki kann gerða, uttan at verða hjástaddur áskoðari, tað er ringt…

Vit komu heim aftur á klettarnar, men Fridrika hevði tað ikki serliga gott, fyri ikki at siga vánaligt, men her stóðu vit so, Fridrika orkaði einki nú, ja faktisk hvørki at liggja ella ganga og vit høvdu trý smá børn, ið bert vóru 2, 5 og 9 ára gomul og eg hugsi at ikki mundi verða stuttligt hjá teimum at síggja mammuna, ikki orka at taka tey upp í heita favnin sín, men bert svinna burtur dag frá degi.

## Versnaði brádliga

Fyrst í mars mánaði ´95 hendi eitt hvørt við sjúkuni hjá Fridriku, hvar hon knappliga eina náttina bleiv ússalig, við ræðuligari pínu, so vit noyddust at hava vakthavandi lækna á vitjan, fyri at geva henni morfin innspræning.

Hon bleiv innløgd á Landssjúkrahúsinum sama morgum, við nógvari pínu og hevði hon tað ikki serliga gott.

Fridrika lá eina viku á Landssjúkrahúsinum, og støðan batnaði, sum dagarnir gingu.

Hon kom aftur til hús, sá sera sjúk út, men túrurin heima var stokkutur, bert eina ræðuliga nátt og bleiv síðani innløgd aftur dagin eftir, við nógvari pínu.
Nú gekk bara niður á bakka hjá henni, dag frá degi.

Dagin fyri Fridrika doyði, vóru øll tey nærmastu á vitjan á Landssjúkrahúsinum, børnini so vakurt pyntaði, tað var eitt hart sýni, at síggja tey siga síðsta farvæl við Fridriku, men tað var sera ymiskt, hvussu tey bóru seg at, tá tey sóu deyðasjúku mammu teirra.

Irdi, ið er elst var 9 ár tá, hon treivst als ikki inni á stovuni hjá Fridriku, hon segði orðarætt: »Mamma sær so løgin út« og rætt hevði hon í tí.

Tann yngra gentan Lóa, ið var 5 ár bar seg at heilt øðrvísi, tí hon vildi upp í songina til Fridriku, fjasaðist við hana, og vildi sova hjá mammuni, hon hevði eisini gjørt eina tekning til Fridriku. Ronni, ið bert var 2 ár tá, vildi sjálvandi upp til mammuna, tað var jú ikki so langt síðani, hann hevði slept boppuni hjá Fridriku, jú atdráttarmegin var enn í kraft.

## Vøkur jarðarferð

Dagarnir, sum komu fóru við at fyrireika eina verduga jarðarferð fyri Fridriku, men tað vóru ótrúliga nógvir »formalitetir«, ið skuldu fáast uppá pláss.

Telefonin ringdi í heilum, hon skuldi sjálvandi takast og spurningar svarast.

Eg hugsi í dag hvussu eg kundi megnað at klára øll tingini, ið skuldu avgreiðast í samband við jarðarferðina, men eg haldi, at man fær eyka kreftir í slíkum føri, tí eg megnaði at klára alt sjálvur, tað var jú málið, ið eg hevði sett mær.

Hetta vóru tungir sorgarkendir og strævni dagar, tí eg hevði eisini børnini rundan um meg alla tíðina, hvar eg royndi at troysta tey, meðan eg sjálvur var í knúsi, tað var torført.

Ein rúgva av fólki kom inn á gólvið hesar dagarnar, tú skuldi jú verða blíður við tey og helst tosa eitt sindur eisini, tá tú bert hugsaði um at sita beint upp og niður, var húsið faktisk á tremur av fólki til tíðir, heilt ótrúligt.

So rann dagurin upp, tá vit skuldu á Landssjúkrahúsið at siga okkara síðsta farvæl, við okkara elskaðu Fridriku, hetta gjørdist ein av teimum ringastu løtunum…

Tann nærmasta familjan hittist úti á Landssjúkrahúsinum. Irdi var rættuliga sperd og kensluliga sundurbrotin, hon bara græt og græt, men Ronni skilti sjálvandi ikki hesa støðuna, tá hann segði mamma, mamma fleiri ferðir…
Lóa »reageraði« heilt øðrvísi, hon hevði gjørt eina tekning til Fridriku, legði hana niður í kistuna til mammuna, so pyntaði hon rundan um Fridriku, við ymiskum, ið hon hevði tikið við sær.

I einari slíkari løtu, fara ótrúliga nógvir tankar ígjøgnum høvdið á tær, tú skalt jú siga farvæl við tað menniskja, ið tú elskar mest av øllum, sum er jú móðirin at børnum tínum.

Fridrika fór úr kapellinum dagin fyri jarðarferðina. Vit høvdu pyntað nógv í kapellinum á Landssjúkrahúsinum, millum annað høvdu vit gjørt fleiri stórar fotomyndir av Fridriku saman við børnunum.

Tað vóru so nógv fólk í kapellinum, at ein stór fjøld var noydd at standa uttanfyri.

Hvussu hevur man tað so eina slíka løtu ???.

Tú skalt jú siga farvæl um allar ævir, við konu og móðir at børnum tínum, hetta er jú tann persónurin, ið tú hevur vígt lív títt til, fingið trý deilig ynskibørn saman við og hvussu kennist henda løtan hjá hesum smáu børnunum, tey skulu jú eisini siga mammuni seinasta farvæl, hana, ið tey hava so nógv brúk fyri og standa so tætt klistraði uppat.

Sera torført, fyri ikki at siga ógjørligt, er at greiða frá einari slíkari løtu, við fáum orðum, men eitt kann tó sigast, at alt liggur í smæsta skeljasorði eina tílíka løtu, eingin skal verða í iva um tað, tí tú hevur eina rúgvu av fólki rundan um teg, tú skuldi tá verið sera heitur, men fakta er at tú kennir teg ísakaldan og totalt einsamallan.

Løtan í kapellinum var sera vøkur men, sum altíð tílíkar løtur tyngd av sorg, sakni og vónloysi.

Fridrika stóð undir børu í Havnar Kirkju um náttina…

So kom dagurin tann svárasti av øllum…

Tað var pyntað nógv í kirkjuni við blómum, kransum og vøkrum myndum av Fridriku saman við børnunum. Prestur var Høgni Poulsen, sami presturur, ið hevði gift okkum, fyri bert knapt 5 árum síðani, hann stóð nú og helt gravtalua yvir hesari ungu kvinnuni, ið hevði so nógv at liva fyri, men ikki vóru tillutaði henni meira enn 37 ár av ævini…

Ein bersøgin pápi, ið Fridrika kendi so væl, tí hon hevði dóttir hansara í Hoyvíkar Skúla, málbar seg soleiðis tá hann hoyrdi andlátið av Fridriku: »Tað er fantastiskt, tey góðu menniskjuni fara tíðliga herfrá, meðan tey keðiligu fáa loyvið at ganga eftir«.

Havnar Kirkja var á tremur av fólki henda dagin til jarðarferðina og fleiri vóru tey, ið ikki fingu sess, tí fullsett var allastaðni, hvar tú vendi tær.

Cornett lærarin hjá Irdi spældi eitt so vakurt lag á cornettina, hetta gjørdi hon saman við orglinum.

Løtan í Havnar Kirkju tók so ein enda, hóast eg hugsaði við mær sjálvum, bara vit kundu sitið har allar ævir og havt Fridriku hja okkum.

Kistan bleiv borin út í bilin og so byrjaði líkfylgið tað tungu gongd út í tann stilla, kalda kirkjugarðin, ein sera tung lang leið havi eg mangan hugsað, tá eg havi gingið eftaná líki.

Tað bleiv sungið í kirkjugarðinum, nógv bleiv grátið, tárini turkaði, men tey spríktu fram aftur hvørja ferð.

## Vístu seg bert við jarðarferðina

Dagarnar eftir jarðarferðina vóru nógv fólk í heimi okkara og telefonin kimaði støðugt, men tú verður ikki varðugur við tað beinavegin, tað kemur fram fyri teg av og á, hvar tú setur tær spurningin, er her ikki blivið nakað tómt og einsligt.

Tað er svárt at ásanna, at ein soleiðis skal blíva totalt gloymdur, tí tú hevur havt deyðan á vitjan.

Vit blíva jú øll, fyrr ella seinri sett skák mát við deyðan, á ein ella annan hátt, spurningurin er bara nær og undir hvørjum umstøðum, men tað, sum síðani hendir bæði við okkum vaksnu og børnunum, er at álit okkara á menniskju verður svekkað, so ein ikki hevur álit á persónar, í tann mun ein hevði áður.

Eg havi mangan, nú aftaná vit mistu Fridriku, ynskt okkum eina betri familju og nakrar fáar veruliga góðar vinir, tí ásannast má, at hesi als ikki hava víst »KULØR« í sorg og sakni okkara, hvørki so ella so…

Gamla orðatakið sigur jú, at tað er í neyðini tú lærir vinir tínar at kenna, vit hava so einki merkt, sæð ella hoyrt til teir tey seinastu mongu árini, síðani vit mistu Fridriku.

Tað sigur mær í øllum førum, at deyðin eisini hevur aðrar avleiðingar við sær, ikki nokk við tað, at tú missir ein av tínum allar kærastu, men tað kostar so eisini bæði familju og teir so nógv umtalaðu góðu vinirnar.

## Tungt at fóta sær aftur

Tað verður ofta havt á munni, hvussu óførir vit føroyingar eru til at hjálpa har í ástendur, men hetta er tó bert úti í heimi, eftir mínari sannføring, tí hvat verður gjørt her heima, fyri at hjálpa teimum familjum, ið koma illa fyri av einari ella aðrari vanlukku, hvar fleiri børn missa forsyrgjara, eftir mínari sannføring rætt og slætt einki.

Tú ert fyri langari tíð síðani koppaður saman, áðrenn komið er á hálva leið. Tú stoytir teg ímóti allastaðni, tí nú passar tú og tíni ikki longur inn í samfelagið, sum einsamallur forsyrgjari við fleiri børnum, lummin er tómur fyri pengar, tí nú kemur bert tann eina lønin inn um gáttina.

Hetta er ein sera hugstoytandi uppliving, tí Fridrika kendi heilt ótrúliga nógv fólk, ikki minst frá sínum arbeiði, sum lærarinna, eg møti jú fleiri av teimum í býnum til tíðir, men fyrr var tað saman við Fridriku, altíð ein heilsan ella eitt lítið prát.

Í dag verður tað helst sneitt hin vegin, hugt niður ella til viks, so ein als ikki hevur møguleikan at koma við einari lítlari heilsan, hetta tykist heilt ótrúligt í mínari verð.

Ein stór tøkk skal falla til starvsfókini á arbeiðsplássi mínum, ið altíð hava verið sera beinasom á so mangan hátt, ikki minst tá Fridrika lá sjúk og tað mangan lá illa fyri hjá mær at verða til arbeiðis, tí eg skuldi verða um Fridriku og samtíðis ansað børnunum.

Omman og abbin úti á Frælsinum skulu eisini hava eina stóra tøkk frá mær og børnunum, fyri tykkara altíð blíða lyndi ímóti okkum, tí tit hava sanniliga eisini merkt hvat tað er at missa, men tykkara gomlu vinir, mótvegis okkara, hava nú verið sera trúgvir at vitja tykkum, tað er fløgandi at vita.

Ein lítil heilsan og áminning til tykkum, familjur og vinir at onkrum, ið missir onkran kæran, sitið ikki og bíði til tað verður kallað á tykkum, um stuðul ella hjálp tá slíkt hendir, men takið tykkum saman, støkkið inn á gólvið, tað kostar einki, spyrjið hvussu tað gongur og um tað er eitt hvørt, tú kanst hjálpa við.

Tað tydningarmesta er hóast alt at viðkomandi, ið mist hevur, veit at tað er onkur av hansara góðu vinum, ið hugsar um hann og kemur bæði tá ið ástendur líkasum til aðrar tíðir, tá alt gongur væl, tí tað er ein góður vinur eftir mínari sannføring.

Tað seinastu tøkkina skal systirdóttir mín J.á.L. hava, tí er hon nevnd, ja so er hon kend…

### Kirkjugarðurin

Vit stóðu hjá gravstaðnum eina langa løtu, eftir at Fridrika hevði nomið tað køldu svørtu moldina.

Síðani komu fólk framvið, tóku í hondina og onkur tók um ein, men eina slíka løtu »registrerar« tú als ikki alt rundan um teg, sjálvt um tú kennir hesi fólkini á ein ella annan hátt, men tú ert, sum gingin í stein.

Niðurboygd í sorg fóru vit, børnini oman á Hotel Hafnia, at verða við til ervið eftir Fridriku, tað var mær ein tung løta, saman við so nógvum fólkum, men Fridrika var burtur um allar ævir.

Tað eru fleiri hundrað fólk rundan um teg, tú sær tey øll, men bítur ikki nærri merki í hvørji tey eru, bert tey fáu, soleiðis er tað bara.

Fólk koma og taka í hondina á tær og siga eitthvørt, tað er jú hvat, ið sømir seg, men tað einasta tú hugsa, hevði eg bara fingið frið og kunna verið næstan einsamallur eina lítla løtu, tí tankar tínir eru als ikki klárir í slíkari løtu. Ervið, fekk eisini sín enda, sum alt annað her á fold…